LM-070/2020

Fylgiskjal 18

Kommunufelagið

AKT 35 Hoyringssvar frá KAF

Fíggjarmálaráðið

Dagfesting
10. januar 2020

Okkara j.nr.
19/12

Málsviðgeri
Eyðun Christiansen

Tygara j.nr. 19/

Viðv. Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn

Fíggjarmálaráðið sendi 27. januar Kommunufelagnum, uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn (Frítøka fyri uttanlandsinntøku, hækking av bundna inngjaldinum og javnbjóðis kapping millum eftirlønarveitarar) til hoyringar. Hoyringsfreistin var 10. februar. Tað vil siga, at hoyringsfreistin er tvær vikur.

Fyri at tryggja, at Kommunufelagið kann viðgera lógaruppskot bæði fakliga og politiskt, eigur hoyringsfreistin ikki at verða styttri enn 4 víkur – tó helst 6 vikur.

Gjørt verður einaferð enn vart við, at lógartænastan hjá Løgmanskrivstovuni í rundskrivi um lógarsmíð, hevur ásett, at ummælisfreistin til lógarbroytingar eigur ikki at vera styttri enn 4 vikur.

Í uppskotinum eru tríggjar ymiskar broytingar. Tær verða viðgjørdar hvør sær niðanfyri.

1. Frítøka fyri uttanlandsinntøku
Í uppskotinum verður mælt til, at uttanlandsinntøka verður frítikin frá at rinda eftirlønargjald. Kommunufelagið hevur ikki viðmerkingar til, hvørt eftirlønargjald eigur at verða rindað av uttanlandsinntøku ella ikki. Talan er um eina politiska raðfesting hjá landsstýrinum. Men víst verður á, at talan er um raðfesting, sum kommunurnar koma at gjalda fyri, tí eftirlønarskatturin fellur til kommunurnar, og tað framgongur ikki av uppskotinum, at ætlanin er, at kommunurnar skulu fáa endurgjald fyri mista inntøku.

Sambært uppskotinum, so rindaðu persónar við uttanlandsinntøku í 2018 umleið 4 mió. kr. í eftirlønarskatti. Men tá var bundna gjaldið einans 4%. Sum frálíður kann uppskotið sostatt hava við sær, at kommunurnar missa eina væl hægri upphædd, so hvørt sum bundna gjaldið hækkar. Endaliga upphæddin er torfør at meta um, men talan kann lættliga gerast um 10-15 mió. kr. sum frálíður.

Talan verður um upphædd, sum verður tikin beinleiðis av tí upphæddini, sum kommunurnar fáa til raksturin av eldraøkinum. Kommunurnar fáa eftirlønarskattin í mun til tal av borgarum 67 ár og eldri, so kommunur við nógvum eldri borgarum koma at missa mest.

Í hesum sambandi er enn einaferð eisini vert at vísa á, at ein stór rokning longu er ávegis til kommunurnar í sambandi við, at Løgtingið hevur samtykt ein skattafrádrátt í kommunuskattinum til fólkapensjónistar. Hetta kemur at kosta kommununum umleið 12 mió.

kr. í 2020 og 24 mió. kr. í 2021. Havandi í huga, at talið av fólkapensjónistum fer at vaksa við umleið 50% komandi árini, verður helst talan um 36 mió. kr. árliga sum frálíður.

Eins og skattafrádrátturin serliga fer at raka tær kommunurnar við lutfalsliga nógvum eldri borgarum, so rakar hetta uppskotið eisini hesar kommunur serliga meint. Talan verður sostatt um stein oman á byrðu.

Heitt verður tí á Fíggjarmálaráðið um at greiða frá, hvussu hesin missur verður endurgoldin kommununum.

2. Hækking av bundna inngjaldinum
Í uppskotinum verður mælt til, at bundna gjaldið hækkar uppaftur í 15%.

Kommunurnar yvirtóku raksturin av eldraøkinum í 2015. Í hesum sambandi var skatturin av pensjónsinngjøldum fluttur til kommunurnar eftir talinum av borgarum 67 ár og eldri. Ásannandi, at talan var um øki við skjótt vaksandi útreiðslum – tí talið av eldri veksur skjótt í hesum árum – valdi táverandi landsstýri at lata eftirlønarskattin verða høvuðspartin av fíggingini. Høvuðsfortreytin fyri stóra vøkstrinum í eftirlønarskattinum er árliga hækkingin í bundna gjaldinum.

Men í sambandi við pensjónsnýskipanina hjá undanfarnu samgongu, varð bundna gjaldið lækkað úr 15% og niður í 12%. Mett var tá, at hetta fór at kosta kommununum umleið 50 mió. kr. frá 2029 og frameftir. Tá var ikki fyrilit tikið fyri, at lækkingin kann hava við sær, at tey mongu fakfeløg, sum í dag rinda 15% í eftirløn, frameftir kunnu hugsast at lækka eftirlønarpartin av lønini til 12%. Hendir tað, kann kostnaðurin helst tvífaldast – upp í 100 mió. kr. sum frálíður.

Harumframt gjørdi undanfarna samgonga skattin av eftirløn stigvísan. Hetta varð mett at kosta kommununum 26 mió. kr. árliga sum frálíður.

Við hesum uppskotinum fáa kommunurnar sostatt ein part av teimum inntøkum aftur, sum tær mistu vegna pensjónsnýskipanina.

3. Javnbjóðis kapping millum eftirlønarveitarar
Hesa broytingina hevur Kommunufelagið onga viðmerking til.

Samanumtikið
Fyriliggjandi uppskot kemur at kosta kommununum uml. 4. mió. kr. árliga vaksandi til 10 – 15 mió. kr. um árið eftir stuttari tíð.

Saman við øðrum skattalættum, sum sitandi samgonga, eins og undanfarna, hava latið úr kommunukassunum, so legst bara afturat rokningin, sum skiftandi landsstýrið hava sent kommununum seinastu árini.

Kommunufelagið

Í fleiri umførum hava Búskaparáðið og landsstýrið sjálvt (seinast í uppskotinum til pensjónsnýskipan 2020) víst á, at føroyska samfelagið kemur at hava ein haldføristruppulleika orsaka av demografisku avbjóðingum, sum liggja fyri framman.

Havandi í huga, at vit gerast alt meira røktarkrevjandi, so hvørt sum vit eldast, so kunnu kommununrnar væntast at fáa ein munandi útreiðsluvøkstur í mun til tænastur á eldraøkinum komandi árini

Um vit samstundis hava í huga, at lutfallið millum tey, sum eru á arbeiðsmarknaðinum og tey í pensjónsaldri, broytist frá 4,1 í dag til 2,4 komandi árini, og at tænasturnar hjá kommununum í stóran mun eru fíggjaðar við lønarskatti, so er tað eyðsýnt, at kommunali geirin stendur fyri álvarsligum fíggjarligum avbjóðingum.

Tá ið skiftandi landsstýri harumframt áhaldandi gera raðfestingar, sum kosta kommunala geiranum 10 tals milliónir krónur afturat hvørt ár, so er eisini eyðsýnt, at kommunali geirin stendur fyri hóttafalli.

Kommunufelagið fer tí við hesum at heita á landsstýrið og Løgtingið um at vísa framtíðar fíggjarliga haldførinum hjá kommununum í Føroyum størri ans, og saman við kommununum arbeiða við heildarloysnum, sum hava atlit til bæði inntøkur og útreiðslur hjá kommunala geiranum.

Kommunalu tænasturnar eru fyrst og fremst fíggjaðar við persónsskatti. Økjast útreiðslurnar munandi, samstundis sum inntøkugrundarlagið minkar, so er bert ein vegur – at einstaki borgarin rindar meira í kommunuskatti. Tá er einki vunnið.

Vegna
Kommunufelagið

Dennis Holm	Eyðun Christiansen
Formaður	Stjóri